NORÐOYA SPARIKASSI

# SPURNARBLAÐ - VINNUKUNDAR

*Feløg, fyritøkur, einstaklingavirki, stovnar og grunnar*

| | | |
|---|---|---|
| Kundi | Navn felagsins | Telefon |
| | Bústaður | Fartelefon |
| | Postnr. og bygd/býur | Telefax/arbeiðstelefon |
| | V-tal *(Skal skjalprógvast)* | Teldupostur |
| | P-tal *(einstaklingavirki - Skal skjalprógvast)* | Land |
| | Tjóðskapur | Skattskylda |
| Upplýsingar um virksemi | Slag av virksemi | |
| | Hvørji manna nevnd og stjórn felagsins: | |
| | Navn | P-tal |
| | Navn | P-tal |
| | Navn | P-tal |
| | Navn | P-tal |
| | Navn | P-tal |
| | Navn | P-tal |
| | Navn | P-tal |
| | Er felagið skrásett á virðisbrævamarknaði?<br>Ja Nei<br>Um nei - upplýs um møguligar eigarar, ið eiga størri ognarlut enn 25% | |
| | Navn | P-tal/V-tal |
| | Navn | P-tal/V-tal |
| | Um eigarin er felag, skal upplýsast, hvør veruligi fysiski eigarin er - eisini um talan er um fleiri felagslið | |

| | |
|---|---|
| Heimild at tekna felagið | Eru avmarkingar í heimildini — Ja — Nei |
| | Hava onnur enn tey, ið framganga av tekningarútskriftini, heimild at tekna felagið<br>- t.d. sambært viðtøkum ella undirskriftarlista? — Ja — Nei |
| | Um ja: |

| | | |
|---|---|---|
| Navn | P-tal | Heimild |
| Navn | P-tal | Heimild |
| Navn | P-tal | Heimild |
| Navn | P-tal | Heimild |

Tey, ið hava heimild at tekna felagið sambært øðrum reglum enn tekningarreglum felagsins, skulu viðleggja avrit av góðkendum samleikaprógvi

| | |
|---|---|
| Endamál | Hvat er væntaða endamálið við kundasambandinum? *(setið møguliga fleiri krossar)*<br>Løn — Virðisbrøv — Ognarrøkt — Kort<br>Uppsparing — Útlán — Innlán — Annað<br>Annað - vinarliga lýs nærri: |
| Inngjøld av reiðum peningi | Fer felagið regluliga at seta inn størri upphæddir *(t.e. meiri enn kr. 10.000,-)* í reiðum peningi? — Ja — Nei<br>Um ja, greið nærri frá hesum upphæddum og uppruna teirra |
| Móttakari | Fer felagið at nýta kundasambandið til regluligar peningaflytingar, ið verða tiknar út kontant av kontu hjá móttakaranum? — Ja — Nei<br>Um ja, greið nærri frá hesum flytingum og um gjørligt, hvør móttakarin er |
| Umsetningur | Hvat væntast at verða mánaðarligi umsetningurin á kontuni? *(brutto)*<br>Kr. |

| | |
|---|---|
| Uppruni | Er felagið sjálvt endaligi eigarin av teimum fíggjarognum, ið verða fluttar til ella á annan hátt fara um kontu felagsins?<br>Ja Nei<br>Um nei, hvør er so endaligi eigarin av fíggjarognunum?<br>Navn |
| | Bústaður |
| | Postnr. \| Býur |
| | Land \| Telefon/fartelefon |
| | P-tal/V-tal \| Passnummar |
| | Vinarliga upplýs orsøkina til, at felagið luttekur vegna triðjamann |
| | |
| | |
| | Er talan um, at triðimaður er veruligi eigarin av fíggjarognunum, so skal viðkomandi prógva sín samleika og eisini svara slíkum spurnarblaði |
| Samband | Undirritaði loyvir Norðoya Sparikassa at seta seg í samband við felagið umvegis teldupost ella telefon, í sambandi við at nýggjar viðkomandi tænastur o.a. verða settar í verk.<br>Ja Nei |

Undirritaði váttar hervið við trú og heiður, at tær upplýsingar, ið her eru lætnar Norðoya Sparikassa eru rættar og fullfíggjaðar
Eisini vátti eg, at hava móttikið, lisið og góðtikið *"Vanligar viðskiftatreytir"* hjá Norðoya Sparikassa.

, hin / -

*Undirskrift kundans*

**Viðløgd skjøl:**
Avrit av góðkendum samleikaprógvum
Seinasti grannskoðaði ársroknskapur felagsins
Váttað avrit av tekningarreglum felagsins frá Skráseting Føroya
Avrit av evt. undirskriftalistum
Avrit av viðtøkum felagsins
Tekningarútskrift (partafelagsútskrift) frá Skráseting Føroya (ella annað líknandi fyri stovnar og grunnar)

NORÐOYA SPARIKASSI

# VANLIGAR VIÐSKIFTATREYTIR

Tær vanligu viðskiftatreytirnar eru galdandi fyri øll viðurskifti ímillum Norðoya Sparikassa og tygum, uttan so at annað staðiliga er avtalað t.d. í einari innlánsavtalu, útlánsavtalu (kredittavtalu), í goymslutreytum, kekk-/ kortreglum ella bokstreytum m ella øðrum serligum treytum.

## 1. Stovnan av einum kundaviðurskifti

Tá tygum gerast kundi í Norðoya Sparikassa skulu tygum upplýsa navn, bústað og persónstal (P-tal). Tygum skulu vísa pass ella annað skjalprógv við prentaðum P-tali.

## 2. Innsavnan og viðgerð av upplýsingum um tygum

**Innsavnan og brúk av persónsupplýsingum**
Tá eitt nýtt kundaviðurskifti verður stovnað, skrásetir Norðoya Sparikassi upplýsingar m.a. navn, bústað og P-tal at brúka í samband við fíggjarligar veitingar av øllum slagi, herundir kundaráðgeving, kundarøkt, kundafyrisiting, kredittmeting og marknaðarføring.

Í samband við peningagjaldingar, herundir nýtsla av kreditt- og gjaldskortum, kekkum, spar2 v.m., verða upplýsingar frá handlum, peningastovnum og øðrum savnaðar inn. Hesar upplýsingar verða bert savnaðar inn, fyri at Norðoya Sparikassi kann avgreiða gjaldingina rætt og gera kontuyvirlit, gjaldsyvirlit og líknandi.

**Tagnarskylda**
Starvsfólkið hjá Norðoya Sparikassa hevur tagnarskyldu um viðurskiftini hjá tygum og mugu ikki ógrundað geva víðari ella útflýggja upplýsingar, sum tey orsakað av arbeiði teirra í Norðoya Sparikassa hava fingið kunnleika um. Reglurnar fyri tagnarskyldu fylgja lógini um fíggjarligt virksemi.

**Víðarigeving av upplýsingum**
Fyri at kunna halda avtalur við tygum, t.d. flytingar av upphædd til onnur, verða tær upplýsingar um tygum, sum eru neyðugar fyri at eyðmerkja tygum og gjøgnumføra avtaluna, givnar víðari.

Upplýsingar verða givnar víðari til almennar myndugleikar í tann mun, lóggávan krevur tað, til dømis upplýsingar til skattamyndugleikarnar.

Vanligar upplýsingar um kundaviðurskifti tygara, t.d. navn, bústaður og P-tal kann gevast víðari til at røkja fyrisitingarligar uppgávur fyri Norðoya Sparikassa.

**Almennar kundaupplýsingar**
Norðoya Sparikassi kann geva almennar kundaupplýsingar víðari, ið skapa grundarlag fyri uppbýting í kundaflokkar, til aðrar stovnar í samtaki og fyritøkur, ið fleiri fíggjarstovnar eiga í felag. Tað skal tó vera talan um, at Norðoya Sparikassi hevur eina orsøk til at geva hesar upplýsingar víðari, og at hetta ikki stríðir ímóti áhugamálum tygara. Almennar kundaupplýsingar eru t.d. navn og bústaður.

**Innlit í viðgerð av persónsupplýsingunum í Norðoya Sparikassa**
Tygum kunnu altíð fáa upplýsing um, hvørjar upplýsingar um tygum, Norðoya Sparikassi viðger. Um tygum ynskja skrivligt svar, kann Norðoya Sparikassi krevja eitt avgjald.

**Feilir í upplýsingunum hjá Norðoya Sparikassa**
Um Norðoya Sparikassi leggur til merkis, at tað er feilur í upplýsingunum um tygum, ella upplýsingarnar eru villleiðandi, verða upplýsingarnar beinanvegin rættaðar ella strikaðar.

**Mótmæli ímóti marknaðarføring**
Tygum kunnu til eina og hvørja tíð kunna Norðoya Sparikassa um, at tygum ikki ynskja at móttaka marknaðarføringstilfar frá Norðoya Sparikassa.

**Klaga um viðgerð av upplýsingum í Norðoya Sparikassa**
Um tygum eru misnøgd/-ur við viðgerðina av persónsupplýsingum v.m. í Norðoya Sparikassa, kunnu tygum klaga til Norðoya Sparikassa ella til Dátueftirlitið, Tinganes, Postboks 300, FO-110 Tórshavn.

## 3. Rentur

**Rentutreytir**
Rentan fyri tær einkultu innláns- og útlánskonturnar er skiftandi, uttan so at annað er nágreiniliga avtalað.

At rentan er skiftandi merkir, at Norðoya Sparikassi kann broyta rentustigið.

Rentustigið er treytað av kontuslagi, eins og rentustigið fyri alla kontuna kann vera treytað av tí til eina og hvørja tíð verandi saldu á kontuni.

Tygum kunnu fáa upplýsing um rentustig fyri tey einstøku sløgini av inn- og útláni á skeltunum, ið hanga í avgreiðsluhølunum hjá Norðoya Sparikassa, á heimasíðuni ella við at spyrja.

**Broyting av rentustigi**
Norðoya Sparikassi kann broyta skiftandi rentustig uttan ávaring, um broytingin er til fyrimun fyri tygum.

Norðoya Sparikassi kann lækka skiftandi rentustig á innláni og hækka skiftandi rentustig á útláni uttan ávaring, um

- inn- ella útlendskar broytingar í peninga- ella kreditt politikki hava týdning fyri Norðoya Sparikassa, tí vanliga rentustøðið ávirkast, ella
- onnur broyting í tí vanliga rentustøðinum, til dømis á peninga- ella lánsbrævamarknaðinum, hava týdning fyri Norðoya Sparikassa, ella
- broytingar í skattum og avgjøldum hava týdning fyri Norðoya Sparikassa.

Norðoya Sparikassi kann lækka tað skiftandi rentustigið á innláni og hækka skiftandi rentustig á útláni við einum mánaða fyriboðan, um

- marknaðarlig viðurskifti grunda eina broyting fyri eitt ella fleiri kontusløg,
- tey viðurskifti, sum vórðu løgd til grund við áseting av rentuviðurskiftunum hjá tygum broyta seg, ella
- Norðoya Sparikassi broytir sína vanligu rentu- og prísáseting av handilsligum orsøkum, uttan at tað hongur saman við gongdini í tí vanliga rentustøðinum. Handilsligar orsøkir kunnu m.a. vera at fáa eina gagnliga nýtslu av sparikassans tilfeingi ella orku ella at økja um vinningin hjá Norðoya Sparikassa.

Tygum fáa upplýsingar um broyting av skiftandi rentustigi í brævi ella við kunngerð í bløðunum, ella tá Norðoya Sparikassi sendir tað fyrsta kontuavritið ella kontuyvirlitið aftaná kunngerðina.

## 4. Rentuútrokning, rentudagfesting og rentutilskriving

Norðoya Sparikassi ger eina dagliga útrokning av rentu fyri hvørja einstaka kontu á fylgjandi hátt:

Salda x (áljóðandi rentu) / (faktiska dagatalið í árinum).

Hvør mánaður verður roknaður við tí faktiska dagatalinum.

Tá tann dagliga saldan verður gjørd upp, tekur Norðoya Sparikassi útgangsstøði í rentudagfestingini fyri konturørsluni.

Rentudagfestingin er tann dagurin, tá ein inngjalding, útgjalding ella onnur konturørsla fær ávirkan á útrokningina av rentum á einari kontu. Á kontuavriti ella sparikassabók stendur rentudagfestingin undir "virði".

Sum útgangsstøði eru fylgjandi reglur galdandi:

Tá tygum inngjalda í reiðum peningi, við kekki ella við gjaldskorti á eina kontu í Norðoya Sparikassa, er avgreiðsludagurin eftir inngjaldingina rentudagfesting.

Leygardagar, sunnu- og halgidagar, flaggdagur 25. apríl, ólavsøkuaftan 28. juli, ólavsøkudagur 29. juli, jólaaftan og nýggjársaftan eru ikki avgreiðsludagar í Norðoya Sparikassa.

Tá tygum fáa útgoldið í reiðum peningi ein kekk, ið er skrivaður út til tygum, er avgreiðsludagurin rentudagfesting. Rentudagfestingin við inngjaldi av hesum kekki á kontu tygara í Norðoya Sparikassa er fyrsti avgreiðsludagur eftir inngjaldingina.

Tá tygum fáa útgoldið í reiðum peningi, við kekki ella korti frá kontu tygara í Norðoya Sparikassa, er avgreiðsludagurin rentudagfesting.

Tá tygum taka út pening við gjaldskorti ella útgjaldskorti í egnu sjálvtøkum hjá Norðoya Sparikassa, er tann dagurin pengarnir verða tiknir út, rentudagfesting.

Tá tygum nýta kekk til at gjalda í handlum, er tann dagurin, kekkurin verður móttikin í einum peningastovni, rentudagfesting.

Tá tygum nýta gjaldskortið í elektronisku skipanini í handlum ella kortnotuskipanina, er tann dagurin, gjaldsupplýsingin verður móttikin í einum peningastovni, rentudagfesting.

Tá tygum flyta upphæddir ímillum egnar kontur í Norðoya Sparikassa, er avgreiðsludagurin rentudagfesting fyri báðar kontur.

Tá tygum fáa løn sum a-inntøku, er bókingardagurin rentudagfesting.

Tá tygum fáa aðrar vanligar flytingar frá einari kontu í einum føroyskum, donskum ella grønlendskum peningastovni, er rentudagfestingin fyrsta avgreiðsludag eftir, at flytingin er móttikin.

**Tilskriving av rentum**
Fyri flestu sløg av innlánum er galdandi, at Norðoya Sparikassi tilskrivar rentur hálvárliga. Tó kunnu serlig undantøk vera, har rentur verða tilskrivaðar árliga, t.d. serlig átøkstilboð. Rentutilskriving verður gjørd við at leggja tær dagligu rentuútrokningarnar saman og seta tað samlaðu upphæddina inn á kontu tygara. Fyrsta avgreiðsludag eftir rentutilskrivingina er rentudagfesting.

Norðoya Sparikassi tilskrivar rentur fyri útlán antin mánaðarliga, hvønn ársfjórðing ella hvørt hálvár. Rentutilskrivingardagurin stendur á lánsskjalinum.

Rentutilskrivingin verður gjørd við at leggja tær dagligu rentuútrokningarnar saman og taka tað samlaðu upphæddina út av kontu tygara. Rentutilskrivingardagurin er rentudagfesting.

Tilskriving av rentum sæst á sparikassabók, kontuyvirliti ella aðrari uppgerð.

Norðoya Sparikassi kann gera av, at rentuupphæddir undir eina ávísa stødd ikki verða tilskrivaðar kontuni.

## 5. Avgjøld

Norðoya Sparikassi kann rokna sær avgjøld fyri tænastuveitingar, ið hann ger fyri tygum, t.d. fyri at taka sær av einari umlegging. Norðoya Sparikassi kann eisini rokna sær avgjøld fyri at svara spurningum frá almennum myndugleikum í tann mun, Norðoya Sparikassi hevur skyldu til hetta sambært lóggávuni.

Avgjøldini verða antin tikin sum eitt fast gjald fyri tænastuna ella sum prosentpartur ella sum tímagjald í lutfall til støddina av tænastuni. Útrokningarhættirnir kunnu sameinast.

Tey vanligu avgjøldini kunnu síggjast á einum príslista, sum tygum kunnu fáa í Norðoya Sparikassa. Onnur avgjøld verða upplýst eftir fyrispurningi.

**Broyting av avgjøldum**
Norðoya Sparikassi kann til eina og hvørja tíð uttan fyriboðan lækka avgjøld.

Leypandi avgjøld, sum er ein partur av einum verandi sáttmálaviðurskifti, kann Norðoya Sparikassi hækka við einum mánaða fyriboðan, um marknaðarlig viðurskifti liggja til grund fyri einari broyting fyri eitt ella fleiri kontusløg.

Leypandi avgjøld, sum eru ein partur av einum verandi sáttmálaviðurskifti, kann Norðoya Sparikassi hækka við 3 mánaða fyriboðan, um

- tey viðurskifti, sum hvørt sær lógu til grund fyri ásetingini av avgjaldstreytunum hjá tygum, broyta seg.

- Norðoya Sparikassi broytir sína almennu avgjaldsskipan og prísáseting av handilsligum orsøkum. Handilsligar orsøkir kunnu m.a. vera at fáa eina gagnliga nýtslu av sparikassans tilfeingi ella orku ella at økja um (meir)vinningin hjá Norðoya Sparikassa.

Í verandi sáttmálaviðurskifti kann Norðoya Sparikassi av handilsligum orsøkum áseta avgjøld fyri tænastuveitingar, sum Norðoya Sparikassi ikki áðrenn hevur tikið avgjald fyri. Avgjøld kunnu ásetast við 6 mánaða fyriboðan.

Norðoya Sparikassi kann altíð uttan fyriboðan áseta og hækka avgjøld fyri einkultar tænastuveitingar og alment fyri nýggjar avtalur.

Tygum fáa upplýsing um broyting av avgjøldum í brævi ella í kunngerð í bløðunum, og tá Norðoya Sparikassi sendir tað fyrsta kontuyvirlitið aftan á kunngerðina.

## 6. Trotarenta og áminningargjøld v.m.

Um konta tygara er í troti, kemur í eftirstøðu ella verður nýtt í stríð við avtaluna, kann Norðoya Sparikassi krevja trotaprovisjón ella morarentu, avgjald fyri at senda áminningar, og útreiðslur í samband við løgfrøðiliga hjálp til innheinting v.m.

Støddin á áminningargjaldinum stendur á áminningini frá Norðoya Sparikassa. Trotarentan v.m. verður upplýst eftir fyrispurningi frá tygum.

Trotaprovisjónin verður ásett við grund í metingini hjá Norðoya Sparikassa av váðanum av mishildnum krøvum sum heild, og ítøkiliga mishildnum krøvum hjá tí einstaka.

Norðoya Sparikassi kann til eina og hvørja tíð við mishildnum krøvum, umsitingarliga og roknskaparliga velja at steðga rentutilskrivingini. Ein sovorðin steðgur í tilskrivingini av rentum, ið ikki er eftir avtalu við tygum, skal ikki skiljast sum at Norðoya Sparikassi sigur rættin frá sær til at fáa rentu av kravinum og rindan fyri útreiðslur, sum eru komnar afturat seinni. Hetta er galdandi, óansæð um tann nýtta bókføringin verður kunnað tygum við kontuavriti ella líknandi.

## 7. Inngjøld og útgjøld

**Fyrivarni við inngjaldi**
Allar inngjaldingar á kontu tygara, ið ikki eru í hondina, eru við fyrivarni fyri, at Norðoya Sparikassi fær upphæddina. Sama er galdandi fyri inngjaldingar við kekki, sum er tikin av kontu í Norðoya Sparikassa. Fyrivarnið er galdandi, sjálvt um tað ikki er nevnt á kvittan ella aðrari kunning um inngjaldið.

Um tað vísir seg, at virðið ikki er fyri einum útskrivaðum kekki, tekur Norðoya Sparikassi upphæddina av kontu tygara aftur. Um tað verður tikið av kontu tygara, fáa tygum boð frá Norðoya Sparikassa. Norðoya Sparikassi kann flyta aftur eina upphædd, sum er sett inn á kontu tygara við einum týðiligum mistaki hjá Norðoya Sparikassa, t.d. um sama upphæddd verður sett inn tvær ferðir.

**Nýtsla av inngjøldum**
Eitt og hvørt inngjald til eitt lán ella kreditt verður fyrst nýtt til at rinda av rentu og provisión. Tað er galdandi, sjálvt um tygum sjálv/-ur gjalda, ella um inngjøldini koma frá borgsmanni ella veðsetara.

Onnur inngjøld verða síðani nýtt til rindan av avdrátti.

**Broyting av lánsgjaldi**
Norðoya Sparikassi hevur rætt, men ikki skyldu, til at hækka lánsgjaldið sambært hækkandi rentustigi, provisión ella líknandi.

**Avrit**
Tá tygum fáa pappírs- ella elektronisk kontuavrit, skulu tygum beinanvegin kanna, um tað eru flytingar á kontuni, sum tygum ikki kennast við. Er tað so, skulu tygum beinanvegin venda tygum til Norðoya Sparikassa.

Eitt avrit frá sparikassans bókhaldi skal til eina og hvørja tíð vera at meta sum galdandi prógv fyri støddina á skuldini.

## 8. Uppsøgn, mótrokning og broyting av treytum

**Broyting av avtalutreytunum**
Eru serligar treytir avtalaðar við tygum, standa hesar í brotinum ”serligar treytir” í skjalinum.

Tá treytirnar fyri avtaluna hjá tygum verða ásettar, leggur Norðoya Sparikassi dent á samlaða viðskiftaøkið við tygum.

Verða tað gjørdar broytingar í viðskiftaøkinum, sum ikki eru avtalaðar við Norðoya Sparikassa, skilar Norðoya Sparikassi sær rætt til samstundis at broyta avtalutreytirnar.

**Uppsøgn**
Norðoya Sparikassi og tygum kunnu til eina og hvørja tíð siga kundaviðurskiftini upp uttan fyriboðan.

Tá kundaviðurskiftini enda, kann Norðoya Sparikassi uppsiga ábyrgdar- og borgsskyldur, herundir skyldur í fremmandum gjaldoyra, og gera seg leysan av øðrum skyldum, ið kunnu vera gjørdar fyri tygum. Tygum hava skyldu til at gera Norðoya Sparikassa leysan av øllum skyldum, gjørdar tygara vegna og um neyðugt stilla trygd fyri tí.

**Mótrokning**
Norðoya Sparikassi kann uttan frammanundan at boða tygum frá, mótrokna eina og hvørja áogn, ið er fallin til gjaldingar í einari og hvørjari áogn, sum tygum hava ella fáa hjá Norðoya Sparikassa, um ikki annað er avtalað við Norðoya Sparikassa.

Norðoya Sparikassi mótroknar ikki tann partin av tygara løn ella almennum veitingum, v.m. sum er neyðugur fyri at dekka tygara vanliga livikostnað. Peningastovnurin mótroknar heldur ikki innistandandi á kontu, sum eftir lóggávuni ella serligari avtalu er vart ímóti ognarum.

## 9. Ymiskar ásetingar

**Fulltrú**
Tygum kunnu geva øðrum fulltrú til at stíla fyri tygara vegna í samskifti við Norðoya Sparikassa. Ein fulltrú skal vera skrivlig og skal vanliga vera á oyðublaðnum hjá Norðoya Sparikassa. Fulltrúin er galdandi, til Norðoya Sparikassi fær skrivlig boð frá tygum um, at hon er tikin aftur ella broytt.

Um tann, ið hevur givið fulltrúina doyr, fer fulltrúin úr gildi, tá Norðoya Sparikassi fær boð um andlátið. Tað merkir, at kontur v.m. hjá tí, ið hevur givið fúlltrúina, verða stongdar, til skiftirætturin hevur tikið støðu til, hvussu búgvið skal viðgerast.

Gera fleiri kundar avtalu um eina felagskontu, kann hvør av kontuhaldaranum ráða einsamallur yvir kontuni, uttan so, at annað er avtalað. Doyr ein av kontuhaldarunum, hevur Norðoya Sparikassi tó rætt til at steingja kontuna fyri at tryggja búgvið hjá tí deyða.

**Upptøka av telefonsamrøðum**
Fyri at tæna tygum rætt, kann Norðoya Sparikassi taka telefonsamrøður upp. Vanliga hendir tað bara í samband við handil við virðisbrøvum og gjaldoyra.

**Handil uttanlanda**
Um Norðoya Sparikassi tygara vegna skal gera handlar uttanlanda, velur Norðoya Sparikassi eitt handilssamband, um annað ikki er avtalað. Norðoya Sparikassi hevur onga ábyrgd av mistøkum, ið verða gjørd av nýtta peningastovninum, ella fyri kredittvirðinum hjá hesum.

Um tygum hava goymslu av útlendskum virðisbrøvum ígjøgnum Norðoya Sparikassa, hevur Norðoya Sparikassi ábyrgd fyri møguligum mistøkum og kredittvirði hjá tí útlendska handilssambandinum, um so er, at tygum ikki sjálv/-ur hava valt handilssambandið.

Rættarreglur, siðir og viðskiftatreytir kunnu í útlandinum vera rættiliga ymisk frá tí, sum er galdandi í Føroyum. Í tann mun Norðoya Sparikassi er undir útlendskum rættarreglum, siðum og handilstreytum, er hetta eisini galdandi fyri tygum.

**Klagur**
Um tygum vilja klaga um Norðoya Sparikassa, skulu tygum í fyrsta umfari venda tygum til deild tygara.

Um tygum eftir tað framvegis eru ósamd/-ur við viðgerðina hjá Norðoya Sparikassa av áheitan tygara, ella úrslitinum av tí, kunnu tygum seta tygum í samband við tann, ið hevur ábyrgd av klagum í Norðoya Sparikassa. Tygum kunnu biðja deild tygara um at vera víst/-ur til tann, ið hevur ábyrgd av klagum, ella tygum kunnu fáa upplýsingar um tann, ið hevur ábyrgd av klagum á heimasíðuni hjá Norðoya Sparikassa ella á handilsstaði.

Tygum kunnu eisini leggja klaguna fyri Fíggjareftirlitið, Gl. Kongevej 74 A, 1850 Frederiksberg C, Danmark.

**Endurgjaldsskylda**
Norðoya Sparikassi hevur endurgjaldsskyldu, um hann orsakað av mistøkum ella vanrøkt uppfyllir avtalaðar skyldur ov seint ella vantandi.

Sjálvt á teimum økjum, har ein strangari ábyrgd er galdandi, hevur Norðoya Sparikassi ikki ábyrgd fyri missi, sum er orsakaður av:

- samanbroti í/vantandi atgongd til kt-skipanir ella skaða á data í hesum skipanum, ið kunnu førast til niðanfyristandandi hendingar, óansæð um tað er sparikassin sjálvur ella ein útvegari uttaneftir, ið stendur fyri rakstrinum av skipanunum.

- brek á streymskipan ella telesamskipan hjá Norðoya Sparikassa, rættarskerjing ella fyrisitingargerðir, náttúruvanlukkur, kríggj, uppreistur, borgarligur ófriður, sabotasja, yvirgangur ella herverk (herundir telduormar og teldusníking).

- verkfalli, verkbanni, útihýsing ella forðing, óansæð um stríðið er rættað ímóti ella íspunnið av sparikassanum sjálvum ella samskipanini hjá honum og óansæð orsøkina til stríðið. Tað er eisini galdandi, tá stríðið bert rakar partar av Norðoya Sparikassa.

- øðrum umstøðum, sum Norðoya Sparikassi ikki stýrir sjálvur.

Ábyrgdarundantøkan hjá Norðoya Sparikassa er ikki galdandi, um:

- Norðoya Sparikassi átti at dugað at sæð tær umstøður, sum eru orsøk til missin, tá avtalan varð gjørd, ella átti at umgingist ella vunnið á orsøkini til missin.

- lóggávan undir øllum umstøðum gevur Norðoya Sparikassa ábyrgd fyri teimum viðurskiftum, ið eru orsøk til missin.

**Innskjótaratrygdargrunnurin**
Sum kundi í sparikassanum eru tygum ígjøgnum Innskjótaratrygdargrunnin í ein ávísan mun tryggjaður ímóti tapi, um sparikassin verður raktur av konkursi ella gjaldssteðgi.

Innskjótaratrygdargrunnurin svarar fyri m.a. navnamerktum innskotum í peningastovnum við upp til 100.000 evrur pr. innskjótara. Pensjónskontur og barnauppsparing m.a. tekur hann uppá seg uttan upphæddsmark.

Innskjótaratrygdargrunnurin tekur tað eisini á seg, um tygum sum íleggjari hava miss, tí sparikassin ikki kann geva tygum virðisbrøv aftur, sum hann hevur í varðveitslu, stendur fyri ella hevur umsiting av. Tað verða endurgoldnar upp til 20.000 evrur fyri hvønn íleggjara. Innskjótaratrygdargrunnurin hevur útgivið ein faldara, har tygum kunnu lesa meira um, í hvønn mun tygum eru tryggjað/-ur. Tygum kunnu bíleggja faldaran umvegis www.garantifonden.dk

**Eftirlit**
Peningastovnurin er undir eftirliti av:
Finanstilsynet, Gammel Kongevej 74A, 1850 Frederiksberg C, Tlf. 33 55 82 82, www.finanstilsynet.dk

**Broytingar av teimum vanligu viðskiftatreytunum**
Tær vanligu viðskiftatreytirnar og møguligar serligar treytir kunnu broytast uttan fyriboðan, um broytingarnar eru til fyrimun fyri tygum. Tær vanligu viðskiftatreytirnar og møguligar serligar treytir kunnu broytast og nýggjar kunnu skoytast uppí við 3 mánaða fyriboðan, um broytingarnar ikki eru til fyrimun fyri tygum.

Tygum fáa upplýsing um broyting í brævi ella í kunngerð í bløðunum, ella tá Norðoya Sparikassi sendir tað fyrsta kontuavritið ella kontuyvirlitið aftan á kunngerðina. (Treytirnar kunnu eisini síggjast á heimasíðuni hjá Norðoya Sparikassa: www.ns.fo).